# Villblómudagur verður sunnudagin

Aftur í ár verður skipað fyri villblómudegi í Føroyum. Fjórða árið á rað verður tiltakið skipað sum eitt felags norðurlendskt tiltak. Fyrireikararnir tað fyrsta árið vóru plantufrøðifeløgini í Danmark, Noregi og Svøríki. Annað árið komu Finnland, Grønland og Føroyar við, og í fjør kom Ísland eisini við. Plantufrøðifeløg og aðrir plantufrøðistovnar hava staðið fyri at fyrireika. Í Føroyum hevur tað verið Plantudeildin á Føroya Náttúrugripasavni, sum hevur staðið fyri tiltakinum, og fer hon eisini at gera tað í ár.

Stigtakari til felags norðurlendska tiltakið er Danmark, har tey hava skipað fyri villblómudegi í 17 ár á rað.

Tiltakið hevur verið heilt væl vitjað av fólki í øllum aldri. Tríggir túrar vóru í Føroyum fyrsta árið, og annað árið vóru sjey. Í miðal vóru 20 fólk á hvørjum túri. Samanborið við luttakaratølini í hinum londunum hevur undirtøkan verið rímiliga góð.

Í ár verður skipað fyri fleiri túrum kring landið sunnudagin 19. juni. Tað hevur eydnast okkum at fáa fatur á fólki, ið kunnu vera leiðarar á einum túri í Sandoynni, einum í Eysturoynni og einum í Norðuroyggjum, tveimum í Streymoynni og einum í Suðuroy. Sostatt verður aftur skipað fyri 6 túrum í ár. Hesir verða:

Kl. 10.00

Suðuroy, møtið við skúlan í Trongisvági, leiðari: Niels Jacobsen (tlf: 372082)

Streymoy, møtið við tyrlupallin úti við Strond í Tórshavn, leiðari: Anna Maria Fosaa (tlf: 212306)

Streymoy, møtið við parkeringsplássið hjá Eikini við Sandá í Tórshavn, leiðari: Magnus Gaard (tlf: 520419)

Sandoy, møtið í Trøðum, leiðari: Sigga Rasmussen, (tlf: 215929)

Kl. 14.00

Eysturoy, møtið við fótbóltsvøllin á Eiði, leiðarar: Guðrun og Jens Petur Gaard (225587)

Norðuroyggjar, møtið úti í Grøv, leiðari: Kári Purkhús, (tlf: 757840)

Tilmelding er ikki neyðug.

Fólk hava sum heild verið sera væl nøgd við túrarnar, og veðrið hevur hilnast væl. Í miðal hava vit sæð eini fimmti ymiskar plantur í teir tveir tímarnar, ið túrurin vardi.

Um tit hava hug at koma við, so haldið tykkum ikki aftur. Túrurin gevur góðar møguleikar at fáa meira at vita um villan plantuvøkstur í Føroyum, og eingin forkunnleiki til plantur krevst.

Ein túrur út í náttúruna verður meiri áhugaverdur, jú meira ein veit um tað, ið ein sær. Veitst tú, hvussu planturnar eita, eitt sindur um teirra búøki, útbreiðslu, tíðleika, lívfrøði, hvat tær hava verið nýttar til, og um tær kanska verða nýttar enn, jú meira fært tú burtur úr einum túri í náttúrini. Alt hetta fært tú meira at vita um á villblómudegnum.

Skráin liggur eisini á heimasíðuni hjá Føroya Náttúrugripasavni: www.ngs.fo



*Teir báðar tímarnar, sum túrurin varar, hava tey vanliga sæð eini fimm ymiskar villblómur*


PF LEIF MOHR
Stovnað 1935

**Lærlingur til el-heilsølu okkara**

Søkt verður eftir einum lærlingi, at byrja 1. august 2005.

**Vit bjóða**
tær eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan handil. Tað starvast umleið 50 fólk í samtakinum, og kemur tú at taka tær av alskyns uppgávum. Sum lærlingur hjá okkum fært tú gott innlit í nógv viðurskifti, so sum kundarøkt og samskifti, sølu av el-lutum, innkeyp og móttøku av vørum, sending og útkoyring av vørum og annað fyrifallandi arbeiði.

Sum lærlingur lærir tú eisini at brúka allar hentleikar, ið hoyra til eina nútímans fyritøku, so sum internet, e-mail, okkara starvsfólka-skipan, EDV v.m.

Vit kunnu eisini bjóða eitt áhugavert arbeiðspláss í menning.Vit hava eitt gott arbeiðsumhvørvi, har tú fært møguleika fyri at seta títt persónliga merki á arbeiðið. Harumframt eru góðir skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikar.

**Krøv til umsøkjaran**
Tað er ein fyrimunir um tú:
- Hevur FHS, HH-útbúgving ella líknandi útbúgving.
- Hevur kunnleika til teldur.
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur góð samstarvsevni.
- Ert arbeiðssamur, røkin og fyrikomandi.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Leiv Holm (lh@lm.fo) ella Petur Sørensen (ps@lm.fo) á telefon 35 12 20.

**Umsókn**
saman við avritum av próvskjølum og upplýsingum um arbeiðsroyndir, útbúgving v.m. skulu vera P/F Leif Mohr, postboks 3100, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 27. juni 2005.

*P/F Leif Mohr varð stovnað í 1935 og bjóða vit okkum fram sum heildarveitari innan el-útbúnaða. Við 70' ára royndum eru vit tann størsta og mest framkomna fyritøkan av sínum slag í Føroyum, og kunnu bjóða alla tað tænastu, sum nútíðin krevur av einari el-heilsølu. Harafturat kunnu vit við LM handlinum bjóða alt tað nýggjasta og dygdarbesta innan eltól og elútbúnað. P/F Leif Mohr hevur, við atknýttum feløgum, í dag 50 starvsfólk.*

TEAM85

pf Leif Mohr Hoyvíksvegur 53 Postboks 3100 FO-110 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 lm@lm.fo www.lm.fo



P/F ALMA MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA

**Neyðventilatión / flytan av luft - Vortex**
Høgt trykk (560 Pa) og 3600 m3 um tíman.
Slanga kann setast til (305 mm).
Kann millum annað brúkast til ventilation -
- aftaná eldsløkking.
- at turka bygningar.
- tá arbeitt verður í tangum.
- tá arbeitt verður við vandamiklum evnum.
Slanga til Vortex: 7,6 mtr. Kr. 4.750,- við mvg.



Á Hjalla 15 – Boks 1338 – FO 110 Tórshavn
Tlf. 31 58 90 – Fax. 31 35 00 – mail: henrik@alma.fo

Kr. 7.350,- við mvg.





HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL

*hvønn leygardag frá 18. juni*

*Stór føroysk buffet*
*- bert fyri kræsnir gómar*

**Vit bjóða meira enn 30 ymiskir føroyskir serrættir -**

**her kanst tú m.a. finna**
***Tvøst***
***Spik***
***Øður***
***Skerpikjøt***

***- og nógvir aðrir serrættir so sum Grindagrýta, Lambaryggur, Oksaháryggur, Dunnubringa, Reyðtunga, Kalvi, Laksur, Kongafiskur, Saltfiskur...***

**Til størri tiltøk kunnu vit skipa fyri føroyskum dansi og onkrum mentanarligum**

**Borðbílegging á tel 309090 ella reception@ff.fo**

TEAM85

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA · SØRVÁGUR ·
TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo